# Ein langur dagur hjá sumbingum

*Fyri fyrstu ferð í eini 15 ár, hava sumbingar aftur verið í Tindastakki og drigið lunda. Tað var øgiliga nógvur lundi at síggja, men kortini var veiðan ikki góð*

Áki Bertholdsen

Tað var nátt, tá ið teir fóru, og tað var myrkt, tá ið teir komu aftur.

Jú, tað var ein langur dagur, tá ið sumbingar týsdagin vóru í Tindastakki og drógu lunda.

Og ikki var fongurin av tí mesta, so gjørt upp í tímaløn mundi hetta valla loysa seg.

Men her er tað ikki tímarnar, tað snýr seg sum. At fara í bakkan eftir fugli og at røkja bjørgini er gomul føroysk bygdarmentan og hana vilja sumbingar varðveita.

Teir møttu í Pollinum, sum lendingin í Sumba eitur, klokkan hálvgum seks týsmorgunin og teir vóru ikki heima aftur fyrrenn tað gekk til midnátt, og tað var blivið myrkt.

Men Aksal Poulsen, sum var ein av teimum, sum vóru við, sigur, at líkindini vóru av tí besta, so teir fingu ein góðan dag í stakkinum.

Hesuferð fingu teir 450 pisur og tað er ikki meiri enn helvtin av tí, teir plagdu at fáa, tí fyrr kom fongurin onkuntíð upp á 1100 pisur, tá ið teir fingu mest.

Men teir høvdu eisini tvær stengur við sær, so teir fleygaðu eitt sindur inn ímillum og teir fingu einar 250 lundar.

Teir vóru 13 mans við í stakkinum so teir fingu gott 50 fuglar í part.

Annars eru tað einir 20-22 eigarar í Tindastakki.

Stakkurin var býttur í gamlari tíð, soleiðis, at tey, sum ikki høvdu so nógv rættindi í fuglabjørgum, fingu part í Stakkinum ístaðin, og annars varð hann býttur eftir jørðini. Rættindini í stakkinum eru so arvað ættarlið eftir ættarlið.

### Fyrstu ferð í 15 ár

Aksal Poulsen sigur, at hetta er fyrstu ferð í eini 15 ár, at sumbingar hava verið í Tindastakki.

Orsøkin til, at teir fóru aftur í stakkin í ár, var fyri at røkja hann.

– Bjargarøktin hevur sera stóran týdning, ikki minst fyri stakkarnar, tí er tað umráðandi, at fólk gongur í teir við jøvnum millumbilum og trakkar teir saman.

Týsdagin, teir vóru í stakkinum, trakkaðu teir eisini saman.

–Tað verður ongin bøkkur koyrdur á sjógv, men hann verður trakkaður væl og virðiliga niður, til tað er fast undir.

– Har tað er grivið á gos, tvs, at ein torvan er so full av lundaholum, at tú sært hav til allar síðir, fara fleiri mans uppá hana og trakka hana saman, líka niður á fast aftur.

– Og so byrja lundarnir aftur at grava, um ikki fyrsta árið eftir, so annað árið eftir.

– Tað er soleiðis vorðið við lundanum, at hann grevur í holuni hvørt einasta ár. – Og tá ið pisurnar eru floygdar, grevur hann aftur og reinsar holuna, sigur Aksal Poulsen.

Hann heldur, at ein orsøk til, at tað ikki er meiri pisa í Tindastakki er júst tí, at hann hevur verið so leysur og at nógv er skolað burtur, so at lundin nú hevur ov lítið pláss at grava.

### Royndir og óroyndir

Tað var blandingur av royndum og óroyndum monnum, sum vóru við í stakkinum hesuferð.

Aldursforsetin uppi í stakkinum var 71 ára gamli Jákup Joensen, vinnulívsmaður og fyrrverandi løgtingsmaður, men annars vóru onkrir mans uppi í sekstiárinum.

Hinvegin vóru eisini tríggir mans við, sum ongantíð høvdu verið áður.



*- Fongurin var ikki av tí mesta hesuferð. Teir fingu 450 pisur og 250 lundar. Sostatt fingu teir 13 menninir gott 50 fuglar í part*



*Nógv fólk er samankomið í pollinum, tá ið menninir koma aftur*

Av teimum 13 monnunum, vóru níggju mans uppi í stakkinum, meðan tveir vóru á hvørjum av teimum báðum bátunum.

Aksal Poulsen sigur, at orsøkin til, at ongin hevur verið í Stakkinum so leingi, er, at lundin minkaði og tí hildu teir seg ikki til at fara í fleiri ár.

Og síðani bleiv tað bannað at draga lunda.

Men í ár fingu teir so loyvi til at fara í Tindastakk aftur at draga.





*Lundin verður býttur í Pollinum í 13 javnt stórar partar. Teir fingu gott 50 lundar í part, so mált í tímaløn, er hetta ikki ómakin vert. Men her er tað ikki tímalønin, sum telur*

### Ójavnt búgvið

Frásøgumaður okkara sigur, at hetta var í fyrra lagi, at teir fara í Tindastakk.

– Gamalt var ikki at fara fyrrenn fyrsta vikan av august var farin, ella um at vera farin. Men í ár hevur veðrið verið so gott, at menn hildu, at pisurnar vórðu tíðliga búnaðar. Tí fóru vit týsdagin, sigur hann.

Men hann sigur, at tað var ógvuliga ójavnt, sum pisurnar vóru búnar.

– Í summum reiðrum vóru pisurnar longu farnar.

– Í øðrum reiðrum vóru tær akkurát útkomnar og í øðrum reiðrum lógu eggini enn. So tað blivu nógvar pisur lagdar í aftur reiðrini.

– Tær bestu pisurnar eru tær, sum hava eitt sindur av dúni eftir á rygginum, tær verða nevndar drunnpisur.

–Tá ið tær eru floygdar, hava tær mist eitt sindur av holdinum aftur, tí tá hava tær hungrað í tveir, tríggjar dagar ímeðan tær sita uttanfyri holuna og flaksa.

Aksal Poulsen sigur, at pisurnar vóru væl fyri, tí kjósin var full av føði.

– Annars var øgiliga nógvur lundi at síggja, tí tað fleyg ein stórur ringur alla tíðina.

### Ikki allastaðni

Aksal Poulsen sigur, at Tindastakkur er nógv víðførari enn ein skuldi hildið.

Tí er hann byttur sundur í einar seks, sjey partar at draga.

– Tá ið pisurnar eru drignar í einum parti, verða tær lagdar í ávís pláss og so verður farið í næsta pláss at draga.

– Hesuferð vóru vit ikki í tveimum pørtum, og í tí triðja partinum drógu teir bara tað, sum var lættast at koma at.

Høvdu teir drigið allan stakkin, høvdu teir kanska fingið einar 200 pisur afturat, heldur hann.

Aksal Poulsen sigur, at teir hava eisini fingið loyvi til at fara í Sesstakk og hagar ætla teir at fara í næstu viku, um tað viðrar.

Har hava teir verið meiri regluliga, og har er tað mesta, teir hava fingið, einar 2500 pisur. Seinastu árini hava teir ligið um 800 pisur í Sesstakki.

Í Sesstakki eru einir 15 eigarar.



*Eisini børnini eru komin at forvitnast, hvussu stórur fongurin er*

Viðmerking:

## Heldur frælsur í felagsskapi

*Loysing fyri loysingina skyld lítla undirtøku millum fólk – heldur frælsur í felagsskapi enn snúltari uttanfyri!*

Sambært seinastu veljarakanning eru bert smá 28 % av Føroya fólki fyri loysing frá Danmark. Hetta samsvarar helst væl við tey 33% í 1946, tá fólkaviljin í Føroyum reelt heldur ikki var fyri eini loysing. Við 66% vallutøku í 1946 taldu 33% av føroysku veljarunum gott 50% til fólkaatkvøðuna. Í síni lítlu Grønu sigur Høgni Hoydal um fólkaatkvøðuna í 1946: "*En af de mest vægtige grunde til, at folkesfstemningen i 1946 resulterede i et flertal for en selvstændig færøsk stat, var dannelsen af en politisk gruppe, der som de eneste rejste landet rundt og agiterede for et ja til løsrivelse" (síðu 35)*.

Einvegis loysingarpropaganda í 1946 gav helst nøkur eyka prosentir til loysingina, og hetta man hava givið okkara propagandaministara, Høgni Hoydal, blóð upp á tonnina. Men nationalromantiskar myndatalur, líknilsir ella allegoriir uttan realpolitiskan substans er ikki nóg mikið fyri Føroya fólk anno 2000. Í tvey ár hevur okkara propagandaministari brúkt um 20 mill. krónur úr Landskassanum til einvegis loysingar propaganda. Svarandi til danska fólkatalið hevði upphæddin verið 2 milliardir krónur. Úti í heimi fær slíkt avleiðingar, men í Føroyum gongur tað — enn?

Ístaðin fyri at savnast um faktuel virðir í ríkisfelagsskapinum hava ávís innan loysingarrørsluna spesialiserað seg í at tala niðrandi um danir og ríkisfelagsskapin bygt á ógrundaða útspilling og illgiting. Til tíðir hava hesir loysingar haturfuglar eitt so ónærisligt flog, sum bert fjøtraðar undirlutakenslur ella íborið trælalyndi kann geva íblástur til, men sjáldan verður hann lukkuborin, ið sinni ber av trælli!

Blokkstuðulin, sum so mikil hávi verður gjørdur burturúr, er eingin fortreyt fyri ríkisfelagsskapin, men ein kærkomin útjaðarastuðul tá brúk er fyri honum. Gera vit blokkstuðulin til nakað odiøst ella til syndabukk, renna vit okkum føst í okkara egna praksis av útoyggja stuðuli, og niðurgera tey sum har búgva, tí at tey taka ímóti útjaðarastuðuli. Blokkstuðul ella útjaðarastuðul er ein politisk avgerð, sum ikki eigur at verða brúktur sum moralsk kastibløka.

### Trongdskygdur nationalromantikkur

Loysingarrørslan hevur við sínum trongdskygda nationalromantikki avdúkað eitt óføroyskt fundamentalistiskt grundstøði, sum frammanundan útihýsir eini demokratiskari framferð. Við áhaldandi propagandatiltøkum, har bert loysingar meiningar vinna frama, verður roynt at snara og reingja veruleikan. Trúttað verður niður í fólk, at tað er óføroyskt at vera samríkissinnaður, og at samríkisfólk eru ábyrgdarleys. Hetta hóast nógv tann størri parturin av Føroya fólki sambært seinastu meiningarkanning er samríkis sinnað, og at flestu ynskja eina nýskipan innan fyri ríkisfelagsskapin.

Enn eru ongar ítøkiligar konsekvensrelateraðar ætlanir gjørdar fyri fullveldið Føroyar, sum lýsa korini her á landi undir einum tilhugsaðum fullveldi. Tá hugsað verður um, at vit liva í einum landi, har tú ikki fært lán til eitt høsnarhús, uttan at bæði náðgreiniligar tekningar og fíggjarætlan fyriliggja, kann ein spyrja hvar ábyrgdarkenslan er í hesi "prøv lykken" loysingini?

Hóast alt tosið um loysing og gylt lyftir so fyriliggur heldur ikki so mikið sum eitt uppskot til eina tentativa ella ætlandi "fullveldisfíggjarlóg". Sambært íslendsku kanningina fellur vælferðin hjá Føroya fólki við 24% um loysing verður. Eisini danir meta, at ein loysing kemur at geva føroysku vælferðini eitt skot fyri bógvin, soleiðis at okkara vælferð eftir eina loysing kemur niður á støði hjá skotum ella kanska heilt niður á støði hjá teimum í Portugal. Loysingin kemur sostatt at krevja, at tað almenna skal spara hundraðtals mill. krónur um árið, við hópuppsagnum hjá tí almenna til fylgju.

Trongdskygdur nationalromantikkur er eitt haft um beini hjá frælsis hugaðum fólki, tí hann fastlæsir bæði tað persónliga — og demokratiska frælsið. Guð náði tann loysingar arminga, sum her hjá okkum vendir sær frá síni einoygdu nationalromantisku ideologi og mennist fram til eina meiri fjøltáttaða konsekvensrelateraða ideologi, har realiteturin stendur við stýrisvøl. Onkur fráfallin loysingar romantikari hevur enntá verðið kravdur at skrifta í bløðunum!

Nationalromantikkur av øllum slagi hevur altíð klingað væl í oyrunum á ungdóminum, og tað er eisini har loysingarrørslan við síni propaganda hevur stóra undirtøku. Ungdómurin er kensluborin og léttur at ávirka, og tekur ikki altíð dagar ímillum veruleika og propaganda, sum vit eisini kenna alt ov væl frá týsku ungdómsrørsluni undir seinna heimsbardaga.

### Ríkisfelagsskapurin sum familjuband

Loysingarrørslan tosar ofta um ríkisfelagsskapin sum eina familju, sum vit eiga at vaksa okkum úr og flyta heimanífrá. Um vit blíva í myndataluni, so er ríkisfelagsskapurin ikki so ólíkur einum hjúnabandi, har ávísar avtalur og tilhoyrandi bindingar eru galdandi, og at hvør parturin ger tað, sum hon/hann er best/bestur til. Úrslitið er trygd og trivnaður, har familjubond røkka hvørjum øðrum í einum fíggjarligum fyrimuni og útjavnan. Loysingarrørslan konkluderar harafturímóti, at frælsi finst ikki í einum hjúnarbandi (ríkisfelagsskapi), men at bert "singlar" tvs. gamlar gentur og gamlir dreingir hava frælsi til at føla seg fræls og frí?

Ynskir ein at standa uttanfyri ein felagsskap - tað veri seg hjúnaband ella ríkisfelagsskap — so fella felagsrættindini og skyldur burtur. Loysingarrørslan eigur at gera sær hetta greitt og gevast við síni snúltandi og mannminkandi framferð á økinum.

Í okkara 600 ára gamla ríkisfelagsskapi við Danmark hava vit í Føroyum megnað at tryggja okkum eitt nútímans samfelag við eini vælferð og einum útbúgvingarstøði og persónligum frælsi, sum fá av okkum vilja vera fyri uttan. Danska Stjórnin og Fólkatingið hava eisini latið okkum vitað, at ein møguligur nýskipanarsáttmáli innan fyri ríkisfelagsskapin kemur at hava bæði høgt til loft og vítt til veggja, eisini tá talan er um frælsi og ábyrgd.

Tað er púra burturvið, at loysingarrørslan í Landsstýrinum ikki vil kanna møguleikarnar fyri eini nýskipan innan fyri okkara 600 ára gamla ríkisfelagsskap, tá hetta sambært fleiri meiningarkanningum er fólksins vilji. Hvussu kann loysingarrørslan siga, hvat ið er best fyri Føroyar og Føroya fólk, tá tey bert kenna loysingar møguleikarnar í propaganda stíli og als onki kenna til møguleikarnar fyri eini nýskipan innan fyri ríkisfelagsskapin?

Gjørdu vit ístaðin sum Ísland, og arbeiddu fyri at eitt samt Løgting kundi staðið sum garantur fyri einum grundleggjandi nýskipanaruppskoti, sum bygdi á ítøkiligar og objektivar framtíðarætlanir, høvdu vit eitt ástøði eins og Ísland hevði, bæði við einum politiskum vilja og einum fólkavilja til at fremja eina realistiska nýskipan, sum fyri Føroyar p.t. liggur innan fyri ríkisfelagsskapin.

Íslendska framferðin var demokratisk fyrimyndarlig og úrslitið í 1918 og 1944 tala fyri seg: Bæði í Altinginum og til fólkaatkvøðurnar lógu ja-atkvøðunar millum 90 og 100%, tvs. næstan full semja ella konsensus.

Naggatódnin í verandi loysingar samráðingum millum Føroyar og Danmark ber boð um, at einvegis "statspropaganda" ikki megnar at vinna á fólkaviljanum, og tað eiga øll demokratisk sinnað at frøast um. Sitandi samgonga er komin upp í rasshaft av politiskari ómegn og tvørrandi virðing fyri sakligar upplýsing, og átti at kent sín vitjunartíma og ikki sent fleiri "Jákup Sibba" delegatiónir til Kjøpinhavnar at samráðast á hesum sinni!

**Regin Eikhólm**